

**Nakrar villur vóru í opnuni um Fróðskaparsetrið, sum varð prentað í Lestrarblaðnum, og tí prenta vit hava nú umaftur.**

# FRÓÐSKAPAR

**Einasta universitetið í heiminum, sum tekur útgangsstøði í føroyskum viðurskiftum. Umsóknarfreist 1. juni 2011. www.setur.fo**

## Sjúkra-røktarfrøði

Tað tekur 4 ár at lesa til bachelor í sjúkrarøktarfrøði. Útbúgvingin fevnir um bókliga undirvísing á skúlanum og praktiska undirvísing á ymisku deildunum á sjúkrahúsunum, ellis- og røktarheimunum og heimatænastuni kring landið. Býtið er 2½ ár ástøði og 1½ ár klinikk, og er lagt til rættis í mun til sjúkrarøktarøkini.
Høvuðsgreinin er sjúkrarøkt. Harafturat verður undirvíst í lærugreinunum:

- Anatomi/fysiologi/ biokemi, mikrobiologi/ infektiónspatologi, sjúkulæra, føðslulæra, heiliráðfrøði, ergonomi
- Námsfrøði, heimspeki, sálarfrøði, samskifti.
- Vísindaástøði/gransking,
- Samfelagsfrøði, løgfrøði, leiðsla.

Bachelorútbúgvingin gevur atgongd til hægri lestur á masterstigi.
Enn ber ikki til at lesa master í Føroyum, men eftir ætlan fer SRFS at bjóða út skeið á masterstigi í 2012 sum partur av masterútbúgving.
22 lesandi verða tikin inn árliga.
Upptøkukrav er miðnámsprógv ella samsvarandi útbúgving.
Umframt útbúgving til sjúkrarøktarfrøðing, bjóðar Sjúkrarøktarfrøðiskúlin út ískoytisútbúgving til bachelor í sjúkrarøktarfrøði til sjúkrarøktarfrøðingar útbúnir eftir eldri námsskipanum, kliniska vegleiðara útbúgving og stakskeið í patientologi og gerontologi.
Heystið 2011 verður bjóðað út klinisk vegleiðara útbúgving og skeið í gerontologi.



**Føroyamálsdeildin:**

## Føroyskt

Á Føroyamálsdeildini eru nógvar ymiskar lærugreinar innan evnið "føroyskt". Ævintýr, yrkingar, týðingarfrøði, máltøka, barnamál, postkolionalisma í bókmentum, purisma o.m.a.
Lærugreinarnar tvey tey fyrstu árini eru fastar, málsligar og bókmentaligar umleið helvt um helvt, men á BA-árinum og á masterlestrinum velur tú millum ymsar greinar. Valfríu lærugreinarnar eru skiftandi.
Til ber at lesa bæði bachelor og master í føroyskum.
Lesturin er skipaður við tveimum árum av støðisnámi og einum bachelorári, og um tú ynskir at fara víðari, eru tvey ár av masterlestri.
Partur av náminum kann takast aðrastaðni í Norðurlondum.
Nýggj lesandi verða upptikin annað hvørt ár, næstu ferð í 2012
Upptøkutreyt er miðnámsprógv við góðum karakteri í máli.
Summarskeið í føroyskum fyri útlendskar studentar:
Føroyamálsdeildin hevur sum part av norðurlendskum samstarvi summarskeið í føroyskum fyri norðurlendskar .
Harumframt altjóða summarskeið sí: www.setur.fo Faroese Summer Institute 2011.



**Náttúruvísindadeildin:**

## Jarð- og havfrøði

Í bachelorútbúgvingini í Jarð- og havfrøði ber til at velja seg inn á tríggjar høvuðsrætningar: jørð, hav og veðurlag/ umhvørvi.
Jarðvísindaligi parturin snýr seg m.a. um jørðina og hvussu hon er broytt gjøgnum milliardir av árum, um samansetingar av undirgrundini og leitingarhættir eftir ráevnum í henni.
Havvísindaligi parturin snýr seg um streym, aldu, sjóvarfall, sjóvarfallsorku og um hvønn týdning havið hevur fyri veðurlagsbroytingar.
Umhvørvisparturin snýr seg um vistfrøði við serligum atliti til føroyska umhvørvið.
Aftan á bachelorútbúgvingina í Jarð- og havfrøði á Náttúruvísindadeildini ber til at útbúgva seg víðari til master uttanlands.
Lestrarbyrjan í august 2012.
Upptøkukrav: miðnámsprógv við støddfrøði á A-stigi, alisfrøði á B-stigi og evnafrøði á C-stigi. Aðrir upptøkumøguleikar eru lýstir undir "upptøkutreytir" á www.setur.fo.



**Náttúruvísindadeildin:**

## Lívfrøði

Á Náttúruvísindadeildini ber til at taka bachelorútbúgving í lívfrøði. Lært verður um, hvussu livandi verur eru uppbygdar og virka, og um tilgongdir og menning á øllum lívsstigum, heilt frá DNA í tí einstøku veruni. Evni eru eisini um evna- og lívevnafrøði, sum stuðla undir fatanina av lívfrøðiligum fyribrigdum. Støði verður tikið í djóra- og plantuheiminum á sjógvi og landi.
Eftir lokna útbúgving ber til at útbúgva seg víðari til master uttanlands.
Lestrarbyrjan í august 2012.
Upptøkukrav: miðnámsprógv við støddfrøði á B-stigi, alisfrøði á B-stigi og evnafrøði á B-stigi. Aðrar fortreytir kunnu góðtakast eftir nærri meting í hvørjum einstøkum føri.



**Náttúruvísindadeildin:**

## KT- verkfrøði

Nýggjasta útbúgvingin á Náttúruvísindadeildini er bachelor í KT-verkfrøði. Sum nakað serstakt er ein partur av hesi útbúgvingini skipaður við fjarlestri á Mittuniversitetet í Svøríki. Útbúgvingin gevur eina breiða vitan um kunningar- og samskiftistøkni. Dentur verður lagdur á software menning innan tekniskar, fyrisitingarligar og handilsligar telduskipanir.
Eftir lokna útbúgving sum KT-verkfrøðingur ber til at útbúgva seg víðari til master uttanlands.
Lestrarbyrjan í august 2012.
Upptøkukrav: Miðnámssprógv við B-stigi í støddfrøði.





## Gransking

Fróðskaparsetrið er ein granskingar og undirvísingarstovnur, sum tekur lut í bæði heimligari og útlendskari gransking. Granskarnir á Fróðskaparsetrinum samstarva við starvsfelagar á útlendskum universitetum um verkætlanir og eisini er nógv samstarv millum teir føroysku granskingarstovnarnar.

## Cambridge Certificate skeið í enskum

Til ber at taka trý ymisk skeið í enskum á Fróðskaparsetrinum. "First Certificate" er á lægsta torleikastigi, síðani kemur "Advanced English" og at enda "Proficiency in English". Proficienncy in English er upptøkukrav á flestu enskmæltu universitetunum. Undirvísingin er frá oktober til juni og í ár byrjar undirvísingin 19. og 20. oktober 2011. Kostnaðurin er 3000,00 kr umframt próvtøkugjald.